# Palli Gregoriussen 75 ár


*Palli Gregoriussen*

Tann 24. apríl verður ein kendur havnarmaður, Palli Gregoriussen, arkitektur, 75 ár. Palli hevur sum fáur sett síni fingramerki á, hvussu tað hevur verið bygt í Føroyum seinastu meira enn 40 árini.

Tað kann sigast, at tað sama hevur eisini verið galdandi fyri hansara móðurætt, sum er av tí kenda Argefólkinum. Tað hevur fostrað nógvar úrmælingar innan handverk og bygging. Mest eyðsýnt eru teir ymisku bygningarnir, sum eru laðaðir úr gróti kring um í Havnini. Bert fá dømi um hetta er gamli kommuskúlin, har býráðið nú húsast, og sparikassin í miðbýnum í Havn.

Mamma Palla var Liffa, sum vit minnast fyrst og fremst sum kvinnusakskvinna og sum hattamakari. Pápi Liffu var Sigmund Arge, sum var ein kendur smiðjur. Hann hevði smiðju niðri í Grind, sum smiðjan í Lítluvík í Havn. Her vóru fimm smiðjur, sum kunnu roknast sum eitt tað fyrsta ídnaðarøki í landinum. Smiðjan hjá Sigmundi var tann fyrsta í Føroyum, sum kundi lata lærlingum lærubræv, tá ið lærutíðin var úti.

Eitt dømi um handverkið hjá Sigmundi eru gróthúsini hann bygdi sær. Tey standa við síðuna av Skálabúðini í Dr. Jacobsensgøtu. Her húsaðist Sigmund saman við konuni Margrethu, ættað úr Skopun, við átta døtrum og fostursoni úr Íslandi. Hesi hús gjørdust næsti granni hjá ættini hjá honum, sum skrivar hesar reglur.

Faðirættin hjá Palla var eisini sera framúr. Pápin, Magnus, var ættaður úr Kvívík, og var hann bróðursonur Jóan Petur upp í Trøð, sum hevur verið eitt flogvit. Hann var skald av teimum stóru, hóast hann mestsum ikki hevði gingið í skúla og als ikki hevði lært føroyskt. Hann týddi eisini ein part av Bíbliuni til føroyskt! Jóan Petur var eisini hegnismaður og íðin fotografur, og honum fyri at takka eru nógvar søguligar myndir úr Kvívík. Palli kann av røttum vera stoltur av abbabeiggjanum, og hann hevur verið við til at skipað fyri framsýning í Kvívík av hansara forvitninsligu fotomyndum.

Palli fór í skúla hjá mostur síni Betti Arge, sum hevði privatskúla í umrøddu gróthúsum hjá Sigmundi. Sagt var um Betti, at hon var ógvuliga ættarkøn og søgufróð, og hon dugdi sera væl at hugtaka børnini, millum annað við at fara út í náttúruna við teimum. Her gekk Palli í skúla, inntil hann fór í millum- og realskúla.

Tað var ikki so løgið, um Palli fekk hug til at ganga somu leiðir sum forfedrarnir. Hann kundi ikki fara í læru sum handverkari, tí hann var lámur! Tá var hildið, at hetta kundi ikki bera til. Men hann fór so at læra, fyrst til bygningskonstruktør og síðan til arkitekt. Hann var liðugur í 1960, og árið eftir stovnar hann egna teknistovu í Havn, bert 29 ára gamal.

Síðan hevur tað gingið slag í slag. Kirkjur, skúlar, stovnar, søvn og sethús og mangt annað er komið frá hansara hond hesi 46 árini Palli hevur virkað sum arkitektur. Millum kendastu verkini eru ellisheimið í Vágunum, útvarpshúsið og listaskálin. Listaskálin verður roknaður sum høvuðsverkið hjá Palla, og hann stendur eisini hansara hjarta serliga nær.

Tað, sum Palli ikki er minni kendur fyri, eru hansara tekningar, sum nógvar eru komnar út í bók. Eitt stórverk eru tær tríggjar bøkurnar við tekningum av øllum kirkjunum í Føroyum, sum eru bygdar undan 1960. Innihaldið var eitt túsundtal av litaðum tekningum. Frá kortmyndum av bygdaløgunum fyrr og nú, har kirkjurnar standa, til flatmyndir, skurðir, myndir av útsíðum, av útgerð innan, stólavangum, kórsveggjum og snældum, prædikustólum, doypifuntum, lesipultum, altartalvum, ljósstakum klokkum eins, og tað finst eisini kunning um hesar kirkjur. Hetta bókaverk er ein mentunargripur, sum Palli eisini fekk M.A. Jacobsens virðisløn fyri.

Burtur úr hesum arbeiði kom tann stóra framsýningin í sambandi við 1000 ára haldið fyri kristnanina í Føroyum í 2000. Hetta er ein framsýning, sum hevur ferðast um Norðurlond.

Bókin við tekningum úr Havn er eisini ein dýrgripur serliga hjá okkum, sum hava røtur í Havnini. Og so ikki um at tala bókin „Um heimsins borgir“ við tekningm av kendum støðum í ymiskum stórbýum kring heimin. Tann, sum hevur verið á hesum støðum, sum tekningarnar eru frá, følir seg nærum sum at vera á staðnum aftur.

Palli hevur verið við á mongum framsýningum, eisini í útlondum. Ein serlig framsýning var í 1999 í jútska býnum Thyregod, haðani kona hansara, Tove, var ættað.

Tað, sum er eitt sermerki fyri tey hjá Sigmundi á Argjum, er eitt gott samanhald. Hóast átta døtur í húsinum, komu ”bert” 13 systkinabørn. Men mosturin Betti, sum var ógift, gjørdi nógv burtur úr at skapa samanhald millum systkinabørnini, og hetta samanhaldið stendur framvegis við. Hetta er í sær sjálvum ein góður eginleiki. Systkinabørnini geva Palla tað skoðsmál, at hann er dámligur og fyrikomandi at vera saman við, og hetta er eisini tað umdømi, hann hevur millum fólk.

Palli giftist við Tove, sum hann hitti, tá hann las niðri. Tey fingu fýra børn Magnus, Frants, Elisabeth og Katrin. Tove doyði fyri nøkrum árum síðani, og nýggja kvinnan í lívinum hjá Palla er Anna Maria.

Palli er burtustaddur føðingardagin, men tað verður ynskt honum hjartaliga tillukku við teimum 75 árunum við vón um, at meira verður at frætta frá honum.

**ó**


*Vit hava frá Maritu hjá Signu lænt hesa myndina av systkinabørnum, sum eru umrødd í greinini. Tey eru: Aftasta rað f.v.: Anna Margretha hjá Lillu, Ragna hjá Ninnu. Miðraðið: Simmi hjá Ninnu, Palli hjá Liffu, Hjørdis hjá Lillu, Sigmund hjá Lillu, Andreas (Dia) hjá Liffu. Fremsta rað: Sigmund hjá Liffu, Guggan hjá Signu og Marita hjá Signu. Jóan Petur hjá Liffu var ikki føddur, og Elsa, sum átti Gunnvør og Bergtóru, búði niðri, tá myndin varð tikin*

## Tøkk

Eg takki hjartaliga øllum, sum gleddu meg á 80 ára degnum tann 20. desember 2006.
Tøkk fyri uppringingar, blómur og fjarrit.
Tøkk til tykkum øll, ið gleddu meg við at koma

**Sigrid Poulsen í Skemmuni**
**Porkeri**

## Tøkk

Takk til øll tey, sum gleddu meg á 45 ára føðingardegnum 13. januar 2007.
Takk til køksdamurnar fyri teirra hjálpsemi.

**Blíar heilsur**
**Sólgerð Midjord**

Lesið
Sosialin
-so eru tit við!